# Alonso vann á Immola

**Tá Kimi Räikkönen spakuliga snýkti bilin aftur í garaguna, og Fernando Alonso streyk framvið, ivaðust tey flestu nokk um spenningurin ikki var av á hesum sinni. Jenson Button var 10 sekund aftan fyri Alonso og hevði enn ikki avbjóða honum. Michael Schumacher var á 10. plássið aftan fyri Ralf Schumacher og eingi tekin vóru um, at hann fór at gera um seg**

FORMEL 1

*Niels Uni Dam*




*Tríggjar ferðir á rað. Tað var boðskapurin, sum Fernando Alonso sendi eftir kappkoyringina á Immola. Hesaferð var kappingin frá Schumacher tó nakað væl harðari, enn hon hevur verið undanfarnu koyringarnar*

*Mynd: Reuters*

Men Michael Schumacher er ikki vorðin heimsmeistari 7. ferð uttan orsøk. Ferrari bilurin hjá Schumacher hevði eitt sindur meira av bensini enn kappingarneytarnir, og við nøkrum sera skjótum umførum megnaði Schumacher at fara frá 10. støðu áðrenn fyrsta pit-stop upp á 3. støðu aftan pit stoppið. Samstundis var hann beint í hølunum á Jenson Button á øðrum plássið og koyrdi umførini 2 sekund skjótari enn Button og Alonso .

Áðrenn seinna pit-stop megnaði Schumacher at sleppa framvið Button. Aftaná pit-stoppið, varð hann beint í hølunum á Alonso, við 12 umførum eftir, tyktist langt á mál fyri Alonso, sum hevði síðuspeglini full av reyðum Ferrari.

Fleiri ferð var Schumacher beint við at yvirhála Alonso. Men á Immola er sera torført at sleppa framvið, og hóast seinastu 12 umførini vóru nøkur av teimum mest spennandi í fleiri ár, so megnaði Alonso at koyra fyrstur á mál fyri triðju ferð í ár. Schumacher kom á mál 0,2 sekund aftaná. Jenson Button fekk triðja plássið á sigurskammilinum, og avloysarin hjá Juan Pablo Montoya í McLaren-Mercedes Alexander Wurz gav liðnum virðismikil stig á fjórða plássi.

Finnin Kimi Räikkönen byrjaði annars bestur: Av fyrstu byrjunarstøðu økti hann leiðsluna fyrstu umførini. Men knappiliga á 9. umfari, vildi hansara McLaren-Mercedes ikki longur. Longu tá vóru Renault bilurin hjá Giancarlo Fisichella og Minardi bilurin hjá Patrick Friesacher steðgaðir upp. Eisini Ferrrari bilurin hjá Rubens Barrichello steðgaði skjótt aftaná. Hin Minardi bilurin hjá Christijan Albers kom heldur ikki á mál. Hetta var fyrstu ferð at Minardi royndu nýggja bilin, og royndin varð heldur skuffandi.

Aftan á koyringina varð Ralf Schumacher ákærdur fyri óregluligan atburð í samband við eitt pit-stop. Toyota valdu beinanvegin at kæra avgerðina. Verður Ralf dømdur missir hann stigið, sum hann hevur fingið á Immola.

## Úrslitið á Immola

| | Navn | Land | Lið |
|---|---|---|---|
| 1 | Fernando Alonso | Spania | Renault |
| 2 | Michael Schumacher | Týskland | Ferrari |
| 3 | Jenson Button | England | BAR-Honda |
| 4 | Alexander Wurz | Eysturríki | McLaren-Mercedes |
| 5 | Takuma Sato | Japan | BAR-Honda |
| 6 | Jacques Villeneuve | Kanada | Sauber-Petronas |
| 7 | Jarno Trulli | Italia | Toyota |
| 8 | Ralf Schumacher | Týskland | Toyota |
| 9 | Nick Heidfeld | Týskland | Williams-BMW |
| 10 | Mark Webber | Týskland | Williams-BMW |
| 11 | Vitantonio Liuzzi | Italia | Red Bull Racing |
| 12 | Felipe Massa | Brasilia | Sauber Petronas |
| 13 | David Coulthard | Skotland | Red Bull Racing |
| 14 | Narain Kartikeyan | India | Jordan-Toyota |
| 15 | Tiago Monteiro | Portugal | Jordan-Toyota |

| Steðgaðir | Land | Lið |
|---|---|---|
| Christijan Albers | Holland | Minardi-Cosworth |
| Rubens Barrichello | Brasilia | Ferrari |
| Kimi Räikkönen | Finnland | McLaren-Mercedes |
| Patrick Friesacher | Eysturríki | Minardi-Cosworth |
| Giancarlo Fisichella | Italia | Renault |

## Støður, Formel 1

**Koyrarar**

| Navn | Land | Merki | Stig |
|---|---|---|---|
| Fernando Alonso | Spania | Renault | 36 |
| Jarno Trulli | Italia | Toyota | 18 |
| Michael Schumacher | Týskland | Ferrari | 10 |
| Giancarlo Fisichella | Italia | Renault | 10 |
| Ralf Schumacher | Týskland | Toyota | 10 |
| David Coulthard | Stórabretland | Red Bull | 9 |
| Rubens Barrichello | Brasil | Ferrari | 8 |
| Juan Pablo Montoya | Kolumbia | McLaren-Mercedes | 8 |
| Kimi Raikkonen | Finnland | McLaren | 7 |
| Mark Webber | Australia | BMW-Williams | 7 |
| Jenson Button | Ongland | Bar-Honda | 6 |
| Nick Heidfeld | Týskland | BMW-Williams | 6 |
| Alexander Wurz | Eysturríki | McLaren-Mercedes | 5 |
| Takuma Sato | Japan | Bar-Honda | 4 |
| Pedro de la Rosa | Spania | McLaren | 4 |
| Christian Klein | Eysturríki | Red Bull | 3 |
| Jacques Villeneuve | Kanada | Sauber-Petronas | 3 |
| Felipe Massa | Brasil | Sauber-Petronas | 2 |

**Bilar**

| Merki | stig |
|---|---|
| Renault | 48 |
| Toyota | 28 |
| McLaren | 24 |
| Ferrari | 18 |
| BMW-Williams | 13 |
| Red Bull | 12 |
| BAR-Honda | 10 |
| Sauber-Petronas | 5 |

## Red Bull koyra við Ferrari motorum næsta ár

Red Bull Racing og Ferrari kunngjørdu í dag, at liðini hava skrivað sáttmála um, at Red Bull Racing frá næsta kappingarári koyra við Ferrari motorum. Í løtuni koyra Red Bull við Cosworth motorum. Avtalan við Cosworth er leivd frá tíðini tá liðið æt Jaguar.

Avtalan við Red Bull endar eftir øllum samstarvið millum Ferrari og Sauber liðið. Sauber hevur seinastu 9 árini brúkt Ferrari motorar. BMW og Sauber hava seinastu tíðina samráðst um samstarv.

**NuD**

## Avloysararnir vístu tenn

Bæði Alexander Wurz, sum avloysir Juan Pablo Montoya í McLaren-Mercedes og Viantonio Liuzzi, sum avloysir Christian Klien í Red Bull Racing, kláraðu seg stak væl á Immola. Alexander Wurz megnaði at fáa fimm stig fyri eitt flott fjórða pláss. Liuzzi fekk ikki stig í dag, men seti roynda liðfelagan David Coulthard so dyggiliga uppá pláss.

Ein maður sum ivaleyst ræðist tankan um avloysarar er Jacques Villeneuve. Fyrrverandi heimsmeistarin hevur kláráð seg stak illa í ár, og spátt varð um, at koyringin á Immola fór at verða tann síðsta hjá Villeneuve. Um tað er trýsti, sum hevur gjørt munin er ilt at siga. Men Villeneuve koyrdi eina framúr koyring og endaði á einum flottum sætta plássi, seks pláss framman fyri liðfelagan Felipe Massa. Um hetta er nokk at tryggja plássið hjá Villeneuve er enn torført at siga.

**-NuD**